# Hann, ið alist við øsku inni, lítið í leikum dugir!

REGIN MARNERSSON
lærari

**Tórshavnar kommunuskúli saman við hinum stóru skúlunum í Havnini hava víst vegin. Okkara næmingar eru dugnaligir. Okkara nærmingar trívast í skúlanum. Ikki tí at vit hava bestu karmar at arbeiða innanfyri. Men tí at vit hava hugagóð og dugnalig starvsfólk á okkara skúlum. Starvsfólkið er skúlans besta tilfeingið**

Yvirskriftin er úr Brestis kvæði. Tað er ungi Sigmundur, ið vil fylgja faðir sínum til Dímunar. Brestir svarar honum aftur: "*Satt hann sigur, sonur mín", Brestir tók til orða,"eingin skal hjá ungum alva bragdarhugin forða.*" Men hesi eru roysnini, ið býráðsmeirilutin í Havnini nú ger.

Í Havnini hava vit í dag fýra 10. flokstilboð. Øll á skúlum, ið hava nýtt orku at fáa hesi at virka á bestan hátt. Misjavnt er tó, hvussu royndirnar hava hildnast. Tí settust fleiri menskir at kjakast um, hvussu vit í Havnini fingu eitt betri 10. flokstilboð. Útgangsstøðið var, at ein tvísporaður skúli hevði ov lítið næmigagrundarlag at bjóða eitt munagott tilboð í 10. flokki.

Bólkurin bleiv samdur um at ein nýggj eind skuldi gerast. Ein nýggjur skúli. Eitt tilboð, ið gav donskum eftirskúlatilboðum kapping. Men tilmælið er ikki grundað á veruligar møguleikar. Heldur ikki námsfrøðiligt skynsemi. Tilmælið setir eisini nakrar greiðar fortreytir. Serliga eru tað tankin um, at eindin er sjálvstøðug, ið er berandi.

Hesar treytir eru ikki til staðar. Hvørji ráð eru so at taka. Jú, har var eitt minnilutatilmælið í bólkinum, ið á sinni sat. Hetta tilmælið sigur, at í eini skiftistíð, til ein 10. floksdepil er skipaður sum sjálvstøðug eind í egnum bygningi, áttu vit at havt tvinni 10. flokkstilboð í Havnini. Eitt á Eystursklúlanum, og eitt á Kommunuskúlanum. Hetta er tað tilmælið, ið mestur stirðil er í út frá dagsins fortreytum.

Næmingagrundarlag er til tvinni tilboð. Møguleikarnir eru til tess eisini. Eysturskúlin hevur eina væl virkandi framhaldsdeild við 10. flokki og Kommunuskúlin tað sama. À okkara skúla, Kommunuskúlanum, hava vit entá upplivað tað gleiðiliga, at næmingar av øðrum skúlum hava valt at gevast á skúlanum, tey hava gingið í samfull 9. ár fyri at gerast ein partur av okkara 10. flokseind.

Hetta er tí, at vit seinastu 6 árini hava lagt stóra orku í at menna ein 10. flokk, ið er eitt gott tilboð. Eitt øðrvísi og spennandi tilboð, ið vit námsfrøðiliga kunnu grundgeva fyri. Hetta tilboðið vilja vit framhaldandi geva okkara næmingum. Skúli snýr seg um lærdóm, tann lærdómin, ið vit lærarar kunnu gróðurseta og fáa at spíra í okkara næmingum. Tí eru vit ónøgd við, at 10. verður tikin frá okkum. Meta eisini, at hetta er gjørt á púra skeivum grundarlagi.

Í tíðindasending í útvarpinum kl. 18 hin 5/11-2009, samstundis sum býráðsfundur byrjaði, úttalaði býráðslimur seg um, hví tað er rætt at flyta 10. flokk úr Kommunuskúlanum. Útsøgnin var merkisverd, merkt av vantandi innliti í málið. "..*Skal 10. verða har, mugu vit brúka nógvar pengar uppá útbygging av Kommunuskúlanum. ..Tað er gleðiligt, at teir (næmingarnir) trívast og hava tað gott har.., men tað eru bygningarnir, vit taka okkum av. Skulu vit byggja Kommunuskúlan út her og nú, so mugu vit kanska útseta annars ætlaða Ellisheimið úti við Strond.*

Tá renna mær eitt annað ørindi úr Brestis kvæði í hug. *Hoyr tú Beinir, bróðir mín! hvat ráð skulu vit taka? Hasir eru garpar teir, ið okkum ætla at saka.*

Er tað veruliga so, at Tórshavnar kommuna bert hugsar um bygningar? Ikki man so vera. Heldur ikki man grundgevingin halda, at um 10 framhaldandi skal ganga í Kommunuskúlanum, so skal hann dagførast beinanvegin. Tí tað er tað sama sum at siga, at næmingar frá 1. til 9. hava ikki tørv á einum soppafríum skúla. Tað eru bert teir í 10, ið hava rætt til tess. Tí vit hava, sum er, næmingar úr 1. til 10. flokk á skúlanum. Og vit rúmast at vera her, so eg skilji ikki grundgevingarnar.

Leggið ikki saman í óðum verki. Tað passar ikki at hetta fer at kosta okkara gomlu ellisheimið. Tað einasta námsfrøðilig skynsama at gera, er at varveita tvær eindir, til ein 10. depil er stovnsettur, ið setur sína egnu dags og skúlaskrá um nøkrur ár. Tí skúli og skúlaskapur snúgva seg um námsfrøðilig tilboð, trvinað og lærdóm. Ikki bygningar og tómar stovur.

Forrestin, um so nógvar tómar stovur standa á Eysturskúlanum, ið skríggja eftir næmingum, veit eg um ein mentamálaráðharra, ið manglar høli til sínar næmingar, ið ikki sleppa at vara inni í einum øðrum illa viðlíkahildnum bygningi.

Vónandi rennur ikki eitt triðja ørindi úr Brestis kvæði í hug hin 17.desember, tá býráðið skal taka avgerð í hesum týdningarmikla máli. *Tóri runnu tár á kinn, harðnar Sigmunds sinnni: "Grátum ikki frændi mín, vær goymum væl í minni*!"

**Landsvegurin í Lorvík:**

# Vælsignaði, latið nú skilið ráða!

ÓLAVUR HÁTÚN



Við áhuga havi eisini eg fylgt við í landsvegaætlanini í Lorvík og havi harmast um tað politisku viðferð, hetta mál hevur fingið:

Fyrst vildu lorvíkingar als ikki vita av nakrari vegagerð, men kravdu tunnil, sum hevði ført til, at ferðandi til og úr Klaksvík nóg illa sóu dagsins ljós á leiðini millum Norðagøtu og Borðoyavík. Tá hetta ynski ikki fekk undirtøku, var næsta kravið at fáa vegin lagdan niðri í bygdini. Tó var onkur skilamaður í bygdarráðnum, sum mælti til væl útgreinaðu loysnina hjá Landsverkfrøðinginum um vegagerð oman fyri bygdina.

Málið kemur so fyri á tingi, og tað løgna hendir, at meirluti verður fyri ikki at fylgja tilráðingini hjá landsins sakkunnleika í vegamálum. Gleðiligt var tað tá, at bygdarráðið raknar við og biður um at fáa málið fyri á tingi aftur. Men gakk! Nú gerast løgtingsmenn tvørir, og endin verður, at málið verður tveitt lorvíkingum aftur at klandrast um, hóast bygdaráðsmeirilutin tá var komin til ta sannføring, at tilráðingin hjá Landsverki var besta loysnin.

Hvørji privat áhugamál tá við fólkaatkvøðu førdu málið út í óføri aftur, skal her ikki metast um; men ikki havi eg møtt lorvíkingi, sum ikki harmast um úrslitið. Tí órógvandi og ikki sørt vandamikið verður tað fyri bygdarfólkið við ferðslumiklum landsvegi niðri millum hús, sum eisini skerjir atkomuna til fjøru og havnarlag. Og hjá teim ferðandi til og úr Norðoyggjum verður tað ólíka uppliving at leggja leiðina fram við teim hábærsligu Lorvíkar fjøllum við føgrum útsýni yvir bygdarlag og oyggjaland heldur enn at troka seg fram fjøruvegin, har eisini sjórokið ódnardagar mangan man verða til ampa.

Tað kann undra, at óviðkomandi soleiðis kemur sum ketta upp úr høvdatrogi, men at hoyra í útvarpinum í gjákvøldið, at vónir nú kortini vóru fyri góðari vegaloysn í Lorvík, var tann glottin, sum setti meg við telduna.

# Føroyingar fáa riddarakross, tá ið danir verða fongslaðir

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



Hevur heildarveitingin lítlan týdning búskaparliga, so hevur hon stóran týdning fyri stórpolitiska talvið. Hetta var eisini essensurin í samrøðuni í útvarpi Føroya, sum Hilmar Simonsen ger viðmerkingar til. Og taktikkurin í hesum stórpolitikki er m.a. at fáa so nógvar finnur við í spælið sum møguligt.

Kann til álvarsamt skemt leggja afturat, at ein annar taktikkur er at geva riddarakrossar. Í mun til ì Danmark og í flest øllum øðrum framkomnum londum kanst tú sambært revsilóg verða fongslaður, um tú arbeiðir ímóti landsins fullveldi, men í Føroyum er øðrvísið: arbeiðir tú ímóti føroyskum fullveldi, kanst tú rokna við at fáa riddarakross.

Spennandi verður so at síggja hvør av ABC monnunum fer at fáa riddarakross næstu ferð skilakvinnan Margretha stígir á føroyskan vøll. Men onkur verður tað, lít á míni orð! Tað skuldi eisini verið løgið annað, nú hesir tosa um at tiðna blokkin, samtykkja við lóg at vit hoyra undir donsku grundlógina, lóggeva at føroyingar ikki eru ein tjóð. Osfr. Alt eitt samfelt strið fyri at sleppa okkum longur burtur frá føroyskum fullveldi.

Og samgongan er samd. Men sum eitt undantak er hon samd um, at blokkstuðulin eigur at minka í 2010. Í øllum førum um hon velur at fylgja samgonguskjalinum, har tað m.a. stendur, at tað er: *semja millum flokkarnar um, at ríkisveitingin verður lækkað við 15 prosentum av reala inntøkuvøkstrinum av skattum og avgjøldum hjá landskassanum við støði í meðal vøkstrinum seinastu 5 árini. Skipanin kemur í gildi í sambandi við fíggjarlógina fyri 2010.*"

Inntøkuvøksturin, sum sipað verður til í sitatinum, hevur, sambært heimasíðuni hjá Gjaldstovuni, verið góðar 500 mió kr ella 17,4% seinastu 5 árini. Sama tíðarskeið er tann "reali" ella nominelli vøksturin, - tvs vøksturin í brúkaraprístalinum, 11,4%, - sambært heimasíðuni hjá Hagstovuni.

**Vil nakar í ABC halda samgonguskjalið**

So er spurningurin um landsstýrið ætlar at halda tann partin av samgonguskjalinum, sum snýr seg um minking av heildarveitingini. Teir, og kanska serliga samgonguleiðarin, tosa annars dagliga um, hvussu umráðandi tað er halda hetta samgonguskjal. Meðan ongin tosar um at halda tann partin av skjalinum, sum snýr seg um at lækka blokkin. Hinvegin tosa fleiri ístaðin um at tiðna blokkin aftur. Ófatiligt, at ongin sjálvstýriskraft tekur teir, sum tosa um at halda samgonguskjalið, uppá orðið, og vísir á orðingina um blokkniðurskurðin.

**Løgmaður fer skeivur**

Løgmaður segði fyri kortum í einum svari uppá fyrispurning frá Kára á Rógvi, at ongin lækking var í blokkstuðlinum fyri 2010, tí: "vit ikki eru vælsignaði við einum vøkstri ...". Hatta er skeivt. Um ein roknar eftir, so skal heildarveitingin minkað við 4 mió. kr. í 2010, - sambært samgonguskjalinum, tí vit eru "vælsignaði við einum vøkstri!" 4 mió kr er ikki nógv, men tað er so eitt lítið fet á tí røttu kósini!

**Trupulleikin er ikki ráðini, men stýringin**

Støddin á heildarveitingini er í mun til BTÚ minkað støðugt seinastu nógvu árini. Í 1993 var hon 25% av BTÙ, í 2001 var hon 10% av BTÙ, - tað árið varð hon so reduserað við einum triðingi og verður væntandi 5% av BTÙ í 2010 (og ikki 6% sum eg annars segði í útvarpinum sunnukvøldið).

BTÚ er tann samlaða inntøkan vit megna at skapa í Føroyum, blokkurin er síðan ein eyka inntøka til føroyska búskapin; sum, til æru fyri legitimitetin, er oyramerktur at skula verða brúktur til ávísar vælferðartænastur. Hesin gevur okkum tó í veruleikanum eyka rúm til bygnaðarskeivleikar, nýtslu og fastar íløgur. Eg haldi ikki tað liggur stórt meira í hesum, men tað er vert at leggja til merkis, at í sama tíðarskeiðið, síðani blokkniðurskurðin, hava Føroyar sum búskapur samanlagt havt yvirskot á gjaldsjavnanum omanfyri 4 mia. kr. og BTÚ er vaksið við 3 mia. Bara tað ger til skammar uppáhaldið um, at onki kom í staðin fyri blokkniðurskurðin. Og hóast søguliga høgan vøkstur í almenna geiranum síðani blokkniðurskurðin, so megnar samgongan ikki annað enn at semjast um eitt hall á fíggjarlógini, sum liggur um tað einu milliardina.

Trupulleikin í føroyska búskapinum er ikki, um vit hava ráð at minkað blokkin, men ein spurningur um at fáa rættað bygnaðarligar innlendis skeivleikar í almenna geiranum í mun til aðrar geirar, so javnvág kemur í aftur hjá tí almenna.

**Takki fyri viðmerkingina frá Hilmari Simonsen o.ø.**

Eg fari ikki at leggja meg út í kjak við Hilmar Simonsen um multiplikatoreffekt o.l. Tað kundi kanska verið til fínt undirhald hjá onkrum búskaparfrøðingi, men neyvan til gagns fyri okkum bæði at vassa soleiðis, har hvørgin grynnir.

Skilji á Hilmar Simonsen, at hann heldur lítið um mítt vitanarstøðið og um tjóðveldisfólk sum heild. Við hesum sum útgangsstøði er ivingasamt, um vit koma nærri eini semju. Valdi kortini at leggja hesi orð afturat kjakinum – við virðing fyri manninum!